## Carlos á veg til Turkalands

Brasiliumaðurin, Roberto Carlos, fer eftir øllum at døma til turkiskan fótbólt, tá ið hetta kappingarárið er av. Tað ljóðar, at kviki vinstribakkurin hjá Real Madrid er tætt við at gera sáttmála við stórfelagið, Fenerbache. Roberto Carlos hevur ikki verið fastur maður á liðnum seinastu tíðina, og sjálvur sigur hann, at hann skyldar Real Madrid at finna sær nýtt felag. Turkiska stórfelagið hevur fyrr víst áhuga fyri Carlos, og nú bendir alt á, at tað eisini verður komandi felagið hjá lítla brasiliumanninum. Roberto Carlos kom til Real Madrid frá Inter í 1996, og hevur sostatt leikt í spanska stórfelagnum í samfull 11 ár.

## Henrik Larsen aftur til arbeiðis



Nú er líkt til, at fyrrverandi føroyski landsliðsvenjarin, Henrik Larsen, sleppur aftur í starv sum venjari hjá Køge Boldklub. Fyri góðum tveimum vikum síðan fór Køge Boldklub í gjaldssteðg, og Henrik Larsen misti starvið sum venjari á besta liðnum. Nú hevur felagið tú funnið eina fyribils loysn á trupulleikanum, har stuðlarnir punga so mikið av pengum út, at felagið er ment at koma á beinini aftur. Sostatt fer Henrik Larsen eftir øllum at døma til arbeiðis aftur.

# Ungdómslandsliðið gjørdi um seg í Danmark

**Ungdómslandsliðið í borðtennis fekk góð úrslit, tá tað var til kappingina, Brøndby Cup 2007, í Danmark farna vikuskiftið**

BORÐTENNIS

*Pætur Albinus*
*pætur@sosialurin.fo*

Mánadagin komu teir 20 leikararnir á føroyska ungdómslandsliðnum í borðtennis aftur á klettarnar, eftir at hava roynt seg í sterku kappingini, Brøndby Cup 2007. Føroyska ungdómslandsliðið hevði undanfarnu trý árini staðið sum vinnari av ferðasteypinum í kappingini, sum verður latið til tað liðið, ið vinnur flest heiðursmerki. Í



*Jákup Thomasen, Jonhard Ferjá og Páll Heri Nolsøe vunnu øll heiðursmerkini í Dreingir D*

ár gekk aftur væl, hóast ferðasteypið ikki varð endurvunnið.

### Gjørdu um seg

Tað eydnaðist ikki liðnum at vinna ferðasteypið fjórða árið á rað, tó at tað gekk liðnum væl. Serliga var tað 13 ára gamli Jákup Thomasen av Tvøroyri, ið fór illa við danskarunum. Hann vann bæði gull í Drenge C og Drenge D. Eisini var tað 18 ára gamli Ragnar Egilsson úr Havn, ið gjørdi um seg. Landsliðsleikarin fekk sterka mótstøðu, men Ragnar legði líka í. Hann vann 3. deild hjá monnum og U21 B. Nógvir leikarar vóru koyrdir í sterkar bólkar, so at teir av álvara sluppu at royna seg. Hetta merktist kanska eisini seinni, tá ið liðið stóð sum fjórðbesta lið samanlagt – tó bert 5 stig frá ovasta plássi.

### Genturnar skuffaðu

Kvinnuligi leikararnir eru vanligt raskir at vinna føroyska liðnum nógv heiðursmerki, men eins væl gekk ikki í ár. Tær tríggjar Rakul Mikkjalsdóttir, Susie Midjord og Sheila Strøm, standa vanligt einki aftanfyri donsku genturnar, men í ár vunnu tær bert tvey bronsuheiðursmerki. Hesi bæði heiðursmerkini vann 15 ára gamla Sheila Strøm av Tvøroyri. Eisini kann nevnast, at landsliðsleikarin, Susie Midjord, legðist sjúk á túrinum, so hon var ikki á toppinum. Hon plagar vanligt at berjast um allar ovastu rók, men óhepna útfallið forðaði henni hesum í ár.

### Kundu vunnið

Bert 5 stig skuldu til aftrat, so hevði føroyska liðið vunnið ferðasteypið fjórða árið á rað. Ikki eina ein sjúk Susie kundi tryggjað liðnum flottu endurvinningina, men eisini forfallið til túrin var í meira lagi. Úttøkan var lagað soleiðis, at tríggir teir fremstu leikararnir í Føroyum sluppu við, men hesaferð var eingin úr mansunglingadeildini við á túrinum. Hesar óhepnu umstøðurnar gjørdu tað ikki meir enn sannlíkt, at eitt annað lið fyri einaferð skyld slapp avstað við steypinum.

Annars kann túrurin bara siggjast sum eitt jaligt tiltak, tí her fáa leikarar á hvørjum ári møguleikan at møta sterkari mótstøðu, enn teir fáa her heima í Føroyum.

**Vinnarin av ferðasteypinum tey seinastu árini:**

| Ár | Lið |
|---|---|
| 2007 | Esløv |
| 2006 | Føroyar |
| 2005 | Føroyar |
| 2004 | Føroyar |
| 2003 | Hillerød |
| 2002 | Brøndby BC |
| 2001 | Brøndby BC: |

**Føroysku heiðursmerkjavinnararnir:**

**Dreingir D**
Nr. 1 Jakup Thomasen
Nr. 2 Jonhard Ferja
Nr. 3 Pall Heri Nolsøe

**Gentur A**
Nr. 3 Sheila Strøm

**2. deild kvinnur**
Nr. 3 Sheila Strøm

**3. deild menn**
Nr. 1 Ragnar Egilsson

**Dreingir C**
Nr. 1 Jákup Thomasen
Nr. 2 Páll Heri Nolsøe
Nr. 3 Jónhard Ferjá

**Mansunglingar C**
Nr. 1 Fróði Jensen

**U-21 B menn**
Nr. 2 Ragnar Egilsson

**Samlaða støðan í kappingini gjørdist:**

| Nr. | Lið | Gull (5 stig) | Silvur (3 stig) | Bronsa (1 stig) | Tilsamans |
|---|---|---|---|---|---|
| 1. | Esløv | 5 | 3 | 4 | 38 |
| 2. | England | 4 | 3 | 8 | 37 |
| 3. | Munkedal | 5 | 3 | 2 | 36 |
| 4. | Føroyar | 4 | 3 | 4 | 33 |

## HS fingið nýggjan høvuðsstuðul

Størsta svimjifelag í Føroyum, Havnar Svimjifelag, hevur fingið Norðoya Sparikassa sum nýggjan høvuðsstuðul.

Formaðurin í Havnar Svimjifelag Svend Åge Seloy og Marner Mortensen varðastjórin í Norðoya Sparikassa undirskrivaðu eina 2 ára avtalaðu um stuðul til Havnar Svimjifelag.

Á samkomuni í vikuskiftinum í samband við kappsvimjingina varð undirskriva ein tvey ára avtala um stuðul til felagið. Formaðurin Svend Åge Seloy takkar fyri stuðulin og samarbeiði við Norðoya Sparikassa, stuðulin ger, at felagið framhaldandi kann bjóða limum eitt mennandi og dygdargott ungdómsarbeiði.

# Flaggdagsrenning og firmakapping

RENNING

*Tíðindaskriv*

Eins og undanfarin ár fer Bragdið aftur í ár at skipa fyri renning á Flaggdegnum. Byrjað verður stundisliga við Gamla Apotek kl. 16, og er tað beint eftir hugnaliga flaggdagshaldið á Vaglinum í Havn.

Kappingin er fyri børn og vaksin. Gjørt verður vart við, at øll – skjót og minni skjót, ung og eldri – eru vælkomin. Vaksin renna 7,02 km. og børn, fødd í 1994 - 2000, renna umleið 1,8 km.

Umframt at vera ein kapping fyri einstaklingar er Flaggdagsrenningin eisini ein kapping ímillum virkir, stovnar o.t., nevnd firmakapping.

Firmakappingin er skipað á tann hátt, at virkini v.m. kunnu tekna 3-5 vaksnar luttakarar á hvørjum liði, ið so kappast ímóti hvørjum øðrum. Fleiri lið kunnu luttaka frá hvørjum virki. Menn og kvinnur skulu luttaka á hvør sínum liði. Bert tríggjar tær bestu tíðirnar á hvørjum liði telja við í kappingini.

Eftir at komið er á mál fáa allir luttakararnir frukt, Poptop og vatn. Stuðlað hesum hava ávikavist P/F Poul Hansen, MBM og Føroya Bjór.

Vinnandi lið og einstaklingar fáa steyp til ognar. Harumframt verða heiðursmerkir latin til nr. 1, 2 og 3. Høvuðsstuðul til Flaggdagsrenningina er P/F Føroya Shell, sum eisini letur steyp og heiðursmerki.

### Hátíðarhald

Hetta er 21. Flaggdagsrenning og tey sum luttaka fyri 10. ferð, 15. ferð ella 20. ferð í hesi kapping, fáa heiðursbræv. Síðsta ár varð Niels Jákup Jakobsen heiðraður fyri at luttaka fyri 20. ferð á rað.

Síðsta freist at melda til kappingina er mánakvøldið tann 23.04. Áhugað kunnu tekna seg umvegis heimasíðuna hjá FÍF:

http://www.athletics.fo/

Fyrispurningar hesum viðvíkjandi kunnu setast Niels Jákup Jakobsen, tlf. nr. 317854/254027, ella Robert Vilhelmsen tlf. 288075.

Umráðandi er, at navnið á liðnum verður upplýst í sambandi við tilmeldanina.

Tað verður ikki møguligt at melda seg til á staðnum beint undan kappingini.

Luttøkugjaldið fyri vaksin er kr. 60 og fyri børn kr. 30. Luttøkugjaldið skal flytast á konto hjá Bragdinum: 6460 166.239.4. Tilmeldingin er ikki galdandi fyrrenn gjalding er farin fram.

Startnr. og annað skal heintast í ÍSF-húsinum týsdagin 24.4. millum kl. 16 og 18.

***Bragdið***